

Tove Appelgren er høvundur at leikinum “Kärlek kärlek!”. C-G Wentzel spælir allar leiklutirnar. - Eg kenni meg onkuntíð eitt sindur skizofrenan, sigur hann..

Mynd: Heini S. Kristiansen



Leikurin “Kärlek kärlek!” varð framførdur í Kvívíkar skúla í morgun. Børnini livdu við í framførsluni, og fleiri ferðir rungaði láturin millum næmingarnar og lærararnar.

Mynd: Heini S. Kristiansen

# Einmanssjónleikur um kærleika í føroyskum skúlum

**Sosialurin var á staðnum, tá í sjónleikurin “Kärlek kärlek!” varð framførdur í Kvívíkar skúla. C-G Wentzel úr Finnlandi er einasti leikari í leikinum, men hann spælir seks leiklutir. Tove Appelgren, sum er høvundur at leikinum, er sera kend í Finnlandi. Leikurin umtalar romantiskan kærleika á einum støði, sum børn skilja**

SJÓNLEIKUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í dag og í gjár hava C-G Wentzel og Tove Appelgren verið í trimum skúlum og framført leikin “Kärlek kärlek!”. Tove Appelgren er høvundur at leikinum. Hon er eisini dramaturgur og leikstjóri, og hon er væl kend í Finnlandi. Hennara barnabøkur eru týddar til seks mál.

C-G Wentzel spælir allar leiklutirnar í leikinum. Sostatt er hetta ein einmansleikur. Hann og Tove hava samstarva fyrr, og Tove sigur, at henni dámar sera væl at arbeiða saman við so góðum sjónleikara.

Tey vóru í Hoyvíkar skúla í gjár, og í morgun vóru tey í Kvívíkar skúla. Á miðdegi í dag framførdu tey leikin í Miðvágs skúla. Sosialurin var á staðnum, tá ið tey spældu fyri børnunum i Kvívíkar skúla.

### Leiklutirnir

Tað eru seks persónar í leikinum, og C-G Wentzel spælir allar. Drongurin Kevin er høvuðspersónur, og hann er eisini frásøgufólk. So eru tað mamman og pápin. Mamman er feminim og kensluborin, meðan pápin er harður og maskulinur. Saraté er vinkona hjá Kevin, og tey eru forelskaði í hvørjum øðrum, men tey skilja ikki kenslunar. Abbin hjá Kevin er dementur, og omman er eitt grenj.

Saman lýsa allir hesir persónanir eina heldur serliga familju. Kevin kennir ikki til kærleika, og tí tekur hann frástøðu frá tí. Men gjøgnum nógvar løgnar hendingar og samrøður, lærir Kevin um sínar kenslur, og hann og Saraté gerast góð til endans.

Hetta slagið av sjónleiki er sera krevjandi fyri tann einsamalla sjónleikaran. C-G Wentzel klárar framúr væl at skifta atferð og rødd alt eftir, hvønn persón hann spælir. Leikurin er sera stuttligur, og tað var fleiri ferðir, at láturin rungaði millum børnini. Hóast leikurin fór fram á svenskum og finskum, tóktust børnini at skilja leikin. C-G Wentzel dylir heldur ikki fyri, at hann kennir seg eitt sindur skizofrenan av og á. – Tað er sera krevjandi at spæla fleiri leiklutir, og eg má ordiliga samla meg áðrenn og eftir ein sjónleik, sigur C-G Wentzel.

**Kykmyndir:**

Sjá brot úr framførsluni í Kvívíkar skúla og samrøða við børnini undir kykmyndir á www.portal.fo

Alzheimerdagur í gjár:

# Greiða børnum frá um alzheimer

ALTJÓÐA ALZHEIMERDAGUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Í gjár var altjóða Alzheimerdagur, og í tí sambandi skipaði Alzheimerfelagið fyri einum tiltaki í Miðlahúsinum. Tiltakið varð gjørt fyri at kunna børn um sjúkuna og hjálpa teimum at skilja sjúkuna. Nógv fólk møttu upp, og fleiri vórðu noydd at sita á gólvinum og í vindeygakarminum.

Ein søga varð lisin upp um ein drong og ommu hansara, sum hevur Alzheimer. Soleiðis varð greitt skemtiliga frá, hvussu løgin sjúkan er. Eisini varð greitt frá hví, ið fólk við Alzheimer onkuntíð tykjast løgin. Samstundis, sum tað varð flent eftir nógvum, so varð eisini sera væl greitt frá, hvussu vit kunnu hjálpa fólkum við Alzheimer. Við sera einføldum amboðum kunnu vit vera við til at lætta um gerandisdagin hjá fólkum, sum eru rakt av Alzheimer, og teimum avvarandi, sum eru um tey.

Børnini hugnaðu sær ófört. Klovnurin Albinus sat millum børnini og hugnaði sær. Huglagið var gott millum luttakararnar, og seinni var drekkamunur, har ið fólk fingu eitt prát afurvið kaffi.



*Hesi sjey børnini vóru til Alzheimertiltakið í Miðlahúsinum. Tey ganga í barnagarðinum Undir Fjalli. Hvønn hósdag vitja hesi sjey børnini demensheimið Vallalíð. Hetta er fyri at gera umhvørvið hjá teimum gomlu meira livandi.*

Mynd: Snorri Brend



*Søga varð lisin um ein drong og ommu hansara, sum hevur alzheimer. Greitt varð á ein stuttligan hátt frá, hvussu vit, við lættum amboðum, kunnu lætta um dagin hjá teimum, sum eru rakt av alzheimer, og teimum avvarandi*

Mynd: Heini S. Kristiansen